# Fjølmiðlarnir eru ik

**– Eg havi ongantíð sæð fjølmiðlarnar sum eitt statsveldi. Eitt statsveldi hevur heilt aðrar skyldur, enn fjølmiðlarnir hava – og fjølmiðlar hava aðrar skydur enn eitt statsveldi hevur, segði Hans Engell, stjóri á danska Ekstrablaðnum á fyrsta trapputinginum í miðlahúsinum hjá Sosialinum í Vágsbotni í Havn leygardagin**

TRAPPUTING
*Niels Uni Dam*

Miðlahúsið í Vágsbotni legði hart fyri, tá tveir av bestu kjakmonnum í danska fjølmiðlaheiminum leygarkvøldið hildu trapputing. Føroysk fjølmiðlafólk, stór og smá, og onnur áhugað, vóru savnað í hugnaligu hølunum í Vágsbotni fyri at hoyra hesar navnframu harrarnar. Men eisini fyri at uppliva hetta nýbrotið í føroyskum kjaki.

Ábyrgdarblaðstjórin Jan Müller greiddi frá tankanum handan trapputingið, at skapa størri og betri kjak í føroyska samfelagnum. Ætlanin er at hesar kjakløtur skulu verða millum ein og hálvan annan tíma til longdar. Pallborðslutakararnir hava framløgur, og møguleiki er hjá áhoyrarunum at seta spurningar.

Hans Engell legði fyri við at siga, at hann ongantíð hevði sæð fjølmiðlarnar sum eitt statsveldi. Eitt statsveldi hevur heilt aðrar skyldur enn fjølmiðlar, og fjølmiðlar hava aðrar skyldur enn eitt statsveldi. Hann vísti á, at sjálvt um Javnaðarflokkurin eigur Sosialin, so er tað ikki Sosialurin, sum situr í samgongu.

Fjølmiðlar hava skyldu at finnast at, um t. d. eldraróktin er av ov lágari góðsku, ella um sjúkrahúsini ikki eru nóg góð. Men fyri tað noyðist fjølmiðlafólkið ikki at finna sparingar, sum kunnu fíggja eina betri eldrarøkt ella sjúkrahús.

## Public Servic er týdningarmikið

Georg Metz var samdur í, at fjølmiðlar ikki eru eitt statsveldi. Men metti, at fjølmiðlar kanska eiga at verða tiknir við í eina nýggja grundlóg. Hetta fyri at tryggja óheftar fjølmiðlar. Fjølmiðlar hava sera stóra ávirkan, og alneyðugt er at tryggja sær, at teir kunnu virka frítt. Her eru public service miðlarnir sera týdningarmiklir, og eiga at verða varðveittir. Public Service noyðist ikki altíð at undirhalda, og eigur ikki at lata seg kroysta av marknaðarkrøvunum. Public Service eigur so ikki at undirhalda naivt.

Øssur Winthereig spurdi, um Georg Metz veruliga helt, at Public Service noyddist at vera so smalt. Hann helt ikki, at arbeiðið hjá Public Service miðlunum gjørdist lættari av, at mentanarelitan setti krøv um, at tey skuldu senda smalt tilfar.

Georg Metz segði, at sjálvt smá hyggjaratøl sum t. d. 50.000 í Danmark eru høg tøl, talan er um nógv fólk. Public Service hevur eisini skyldu at vísa fólki sendingar, sum tey ikki vistu, at tey vildu síggja.

Sonny Smith spurdi, um Public Service ikki var vorið nakað diffust.

Georg Metz svaraði, at Public Service í Danmark var í upploysn, Anders Fogh Rasmussen hevur sagt: »Vit eru troytt av smaksdómarum«. Hetta er fjas, tí øll siviliserað samfeløg brúka fakfólk til at ráðgeva sær.

## Hví er týdningarmikið

Metz segði, at øll kundu skriva, at tvey flogfør rendu á nøkur háhús í New York. Men tað áhugaverda og týdningarmikla er, hví tey rendu á háhúsini. Men alt ov nógvir fjølmiðlar eru heilt ókritiskir og fáast ikki við, hví hetta hendi.

## Ov fittir fjølmiðlar

Hans Engell hugleiddi um fjølmiðlarnar í Norðanlondum livdu upp til sínar skyldur. Hann helt, at sum heild vóru fjølmiðlarnir ov fittir. Politikkarar, flokkar, virkir og stovnar hava øll spindoktorar og kunningarfólk, sum liva av at villleiða fjølmiðlafólk. Umleið helvtin at fjølmiðlaútbúnum fólki livir av at villleiða hina helvtina, og hetta eydnast ofta væl.

## Einki journalistiskt fak

Georg Metz umrøddi hetta sama »spinnið«. Hann helt tað vera rættuliga ræðandi. Sjálvt um fjølmiðlaútbúgvingarnar gerast alsamt betur, so berjast fjølmiðlafólk eitt hart stríð. Fyrr var talan um eitt »journalistisk fak«, men nú er hetta avloyst av einum miðlamhvørvi. Fjølmiðlafólk skifta millum miðlar og fyritøkur og aftur til miðlar. Hann nevndi, at fjølmiðlafólk t. d. skiftu frá Information til eitt annað blað, víðari í sjónvarpi, síðani til eitt sodavatnsvirkið sum kunningarfólk, til spindoktarastarv hjá einum politikkara, til blaðstjóra á BT og til endans blaðstjóra á Se og Hør. Tá hann so viðmerkti, at hann ikki hugsaði um nakran serstakan, flentu fólk. Núverandi blaðstjórin á Se og Hør, Henrik Qortrup, passar væl til lýsingina.

Georg Metz metti hetta verða ein stóran trupulleika. Ung fjølmiðlafólk kunnu kenna seg kroyst til ikki at verða nóg kritisk. Tí tey kunnu missa møguleikan fyri einum starvið í framtíðini. Hetta er sambært Metz tað mest ræðandi: At fjølmiðlarnir, gloyma at hyggja kritiskt at sær sjálvum.

## Vakurleiki er størsta dygdin

Leif Láadal spurdi, hvussu fjølmiðlarnir skuldu hyggja at støðum sum tí í danska Javnaðarflokkinum. Har óroynda, men vakra Helle Thorning Schmidt vann á roynda Frank Jensen. Har man velur vakurleika fram um dugnaskap. Hans Engell helt ikki, at tað var so svart og hvítt í hesum málinum. Hetta hevði líka nógv at gera við, at Helle Thorning-Schmidt er nýtt blóð, meðan Frank Jensen er eitt kent andlit. Flokkurin hevur tapt tvey val á rað, og tí vilja fólk hava broyting í.

Men Helle Thorning-Schmidt hevði sjálv sagt Hans Engell frá, at hon var kløkk av, hvussu ágangandi




*– Fjølmiðlarnir skulu finnast at, um eitt nú eldrarøktin er av ov vánalig, ella um sjúkrahúsini ikki eru nóg g ella sjúkrahús, heldur Hans Engell, blaðstjóri á Ekstrablaðnum. Georg Metz var samdur í, at fjølmiðlar ikki fyri at tryggja óheftar fjølmiðlar. Fjølmiðlar hava sera stóra ávirkan, og alneyðugt er at tryggja sær, at teir k*



